Høgni um Hoyvíkssáttmálan:

# – Landsstýrið skrivaði undir ov tíðliga

**Høgni Hoydal fegnast um, at Hoyvíkssáttmálin er komin í gildi. Hann fýlist tó á, at sitandi landsstýrið skrivaði undir ov tíðliga. Hann metir ikki, at fyrireikandi arbeiðið hevur verið nóg gott**

HOYVÍKSSÁTTMÁLIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



Høgni Hoydal, tinglimur fyri Tjóðveldisflokkin, heldur, at hugskotið við Hoyvíkssáttmálanum er gott. Tó heldur hann, at javnvágin ikki er nóg góð.

– Íslandssáttmálin gjørdist liðugur longu í 2003. Vit fegnast um getta stigið, sum vit sjálvir hava verið við til at framt. Hugskotið við sáttmálanum er gott, men landsstýrið hevur fuskað við samráðingunum.

– Sáttmálin varð undirskrivaður, áðrenn samráðingarnar vóru lidnar. Løgmaður trumfaði hetta ígjøgnum sum lóg. Teir áttu sjálvandi at lagt tað fram sum eitt uppskot til samtyktar. Tað hava ikki forhandla, áðrenn teir skrivaðu undir. Tí undrar tað meg ikki, at javnvágin í sáttmálanum ikki er nóg góð, sigur Høgni.

### Positivt hugskot

Hann er glaður um hugskotið handan sáttmálan, hóast hann ikki er nøgdur við samráðingartilgondina.

– Hugskotið er positivt. Men tað er harmiligt, at hetta fekk eina so keiðliga byrjan. Løgmaður hevur ikki gjørt eitt nóg gott arbeiði í hesum førinum. Vit standa nú við óneyðugum trupulleikum, sum høvdu verið loystir við samráðingum. Vit ætla at halda eitt vakið eyga við gongdini, nú sáttmálin er komin í gildi, sigur Høgni.

### Týdningarmikið fyri fullveldisrørlsuna

Tjóðveldisflokkurin hevur stóran áhuga í samstarvinum við íslendingar.

– Vit byrjaðu uppá hesa verkætlanina. Politiskt sæð er hon sera týdningarmikil fyri fullveldisrørsluna í Føroyum. Tað er bara keðiligt, at landsstýrið skrivar undir uppá alt. Teir hava veruliga sett okkum í eina keðiliga støðu. Vit skulu ikki vera so undirbrotlig, men heldur krevja okkara rætt sum ein javnbjóðis partur til íslendingar, sigur Høgni.

Høgni vónar, at Hoyvíkssáttmálin kann gerast ein byrjan uppá eitt sterkt norðurlendskt samstarv.

– Eg vóni, at Grønland og Norra koma við í framtíðini og styrkja samstarvið, sigur Høgni Hoydal at enda.

# Barnagarðurin á Strondum liðugur

STRENDUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í morgin skal barnagarðurin á Strondum takast í nýtslu. Tá verður alment hátíðarhald í nýggja barnagarðinum. Tummas Johannesen er tekniskur leiðari í Sjóvar Kommunu. Hann setti sær tíð av í gjár til at vísa Sosialinum runt í nýggja barnagarðinum. Snotuligu hølini verða nýtt til vøggustovu, barnagarð og frítíðarstovu.

Graslíkisvøllurin liggur eitt hanagleiv frá barnagarðinum. Umstøðurnar eru sera góðar, og Tummas er veruliga spentur uppá, at barnagarðurin verður tikin í nýtslu mánadagin. Tað er Fjarðahús, sum hevur smíðað barnagarðin.

– Vit eru sera væl nøgd við arbeiðið hjá teimum, sigur Tummas.

Sum heild eru strandingar spentir uppá nýggja barnagarðin. Tað búgva nógvar barnafamiljur á Strondum, og tað eru sostatt nógv, sum hava áhuga í nýggja barnagarðinum.

– Eg dugi als ikki at gita mær, hvussu nógv koma til hátíðarhaldið í morgin. Tað kann væntast at tað koma nógv fólk. Eg vænti eisini, at fólk frá øðrum stovnum koma at „lúra okkum av".



*Hetta verður fyribils nýtt sum frítíðarstova. Tað eru einans nakrir fáir metrar til vøllin, so har fara børnini helst at nýta nógva tíð*

*Mynd: Heini S. Kristiansen*



*Tummas Johannesen, tekniskur leiðari í Sjóvar Kommunu, er væl nøgdur við nýggja barnagarðin. Hann hevur havt eftirlit við arbeiðnum*

*Mynd: Heini S. Kristiansen*